**Dansifelagið Fótatraðk**

# Hár vísa (Kajsa skegg)

1.Árla var á árinum
vetur tók at lækka.
Lýkka kom í luftina
og sólin fór at hækka.

*Niðurlag:*
*Troðum lettliga dansin!*
*Dagurin skínur so fagurliga*
*komið er hægst á summarið.*

2.Kallað bleiv til fundar saman
inni í Føroyahúsi.
Allir teir við barbaru vildu
skuldi vera fúsir.

3.Fundurin bleiv settur at vera
umleið fyrsta í fjórða.
Skeggið einasta treyt var
frá Malmrósi, filmsleiksstjóra.

4.Kvinnur og menn lótu hárið vaksa
bæði meir og minni.
Nakrir menn høvdu hárið so síðt
teir líktust eini kvinnu.

5.Hárið og skeggið á Kajermann
var sera vakurt vaksið
tá hann var á dansigólvi
tað líktist hestafaksi.

6.Væl lá fyri at leika film
og líkjast einum fári,
vakrast mundi Kajermann vera
við sínum brúna hári.

7.Øllum góðum er endi á,
so sigur orðatakið.
Soleiðis eisini hesaferð
nú hárið lá niður á baki.

8.Hárið á Kaj er fallið alt.
Tað var so tunkt eitt takið.
Latið okkum heiðra hann
við hørðum lógvabraki.

This document was created with Win2PDF available at http://www.win2pdf.com.
The unregistered version of Win2PDF is for evaluation or non-commercial use only.
This page will not be added after purchasing Win2PDF.